## Hillary ávarar Norðurkorea

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, ávaraði í gjár Norðurkorea um, at viðurskiftini millum Norðurkorea og USA fara ikki at batna, fyrr enn norðurkoreanska stjórnin vil samráðast við grannalandið Suðurkorea um at gevast við sínum ætlanum á kjarnorkuøkinum. Hillary Clinton tingaðist í gjár við leiðsluna í Suðurkorea, og í dag helt hon leiðina fram til Kina. Frammanudan hevur hon verið í Japan og Indonesia á sínari fyrstu ferð sum uttanríkisráðharri.



## Einki sprutt á flogi

Í Russlandi eru myndugleikarnir so troyttir av at draga drukkin ferðafólk úr flogførunum, at nú umhugsa teir at broyta lógina, so tað verður bannað at selja selja sterkt umborð á russiskum ferðamannaflogførum. Myndugleikarnir siga, at alt ov ofta eru flogfør seinkað orsakað av druknum ferðafólkum. Eitt nú var eitt flogfar, sum skuldi úr Moskva til Bangkok, seinkað fleiri tímar, tí fleiri av ferðafólkunum høvdu fingið í meira lagi av sterkum niðurum, skrivar AFP.

# Atlantic Airways gott ár

**Hóast altjóða figgjarkreppu og skrædl í partabrævakursinum, megnaði føroyska flogfelagið kortini at koma út við einum sera góðum útsliti fyri 2008. Úrslitið gjørdist 18,6 milliónir krónur í avlopi áðrenn skatt**

ROKNSKAPUR
*Leo Poujlsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nevnd, leiðsla og grannskoðarar hjá Atlantic Airways. Frá vinstru: Ingi S. Joensen, nevndarlimur, Verna Rasmussen, nevndarlimur, Eyðfinnur Jacobsen, nevndarlimur, Jóannes Joensen, grannskoðari, Heini Mortensen, grannskoðari, Marius Davidsen, fíggjarleiðari, Magni Arge, stjóri, Christian Andreasen, nevndarformaður og Petur J. Eiriksson, nevndarlimur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Atlantic Airways kann í roknskapinum fyri 2008 vísa á eitt rakstraravlop á 18,6 milliónir krónur fyri skatt og 15,3 milliónir krónur eftir skatt. Hetta er 14. árið á rað, at føroyska flogfelagið hevur avlop á rakstrinum, og felagið er sera sterkt fíggjarliga at taka við komandi avbjóðingum.

Atlantic Airways økti í 2008 munandi um sínar inntøkur á grundrakstrinum. Úrslitið áðrenn avskrivingar, skatt og kursjavningar var 87 milliónir krónur samanborið við 65 milliónir krónur í 2007. Økingin var 34%.

- Farna árið hevði við sær nógvar avbjóðingar, bæði væntaðar og óvæntaðar, so vit fegnast um, at vit hava gott avlop á botnlinjuni, hava økt um vanligu inntjeningina og eisini styrkt nógv um gjaldførið, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Atlantic Airways vaks nógv um framleiðsluna í 2008. Tímatalið á flogi øktist úr 11.600 tímum upp í 15.000 tímar, ið svarar til 32%. Somuleiðis vaks talið á ársverkum úr 192 upp í 277. Hetta var í sjálvum sær ein stór avbjóðing, men methøgu oljuprísirnir í fjør og óstøðug viðurskifti í altjóða búskapinum settu eisini felagnum stór krøv um at tillaga seg nýggjar og óvæntaðar umstøður.

Útreiðslurnar til brennievni á rutuflúgvingini øktust 27 milliónir krónur í 2008 ella 36%. Avskrivingarnar øktust úr 45 milliónum krónum upp í 60 milliónir krónur orsakað av stórari tilgongd av ognum. Eisini bar felagið 13,5 milliónir krónur í fíggjarútreiðslum samanborið við 9 milliónir kónur. í fíggjarinntøkum í 2007.

### 20 ár á baki

Kortini gjørdist úrslitið eitt munagott avlop, 18,6 milliónir krónur í 2008 samanborið við 29 milliónir krónur í 2007. Eginognin er nú 221 mió. kr., solvensurin 51 prosent, og gjaldførið vaks úr 38 mió. kr. upp í 82 mió. kr.

Partabrævið hjá Atlantic Airways stóð seg best millum flogpartabrøv á norðurlendsku keypsskálunum í fjør. Flest øll partabrøv fullu í virði, og soleiðis var eisini við partabrævinum hjá Atlantic Airways, sum í meðal fall 28 prosent. Hetta var minni enn hini norðurlendsku flogpartabrøvini, sum fullu millum 39 og 77 prosent.

Árið 2008 var eitt merkisár fyri Atlantic Airways, tí 28. mars vóru 20 ár liðin, síðan felagið fleyg sín fyrsta túr millum Vágar og Keypmannahavn.

Í 1988 fór felagið á flog við einum flogfari, sum bjóðaði av á rutuni til Keypmannahavnar. Tá vóru sløk 30 fólk í starvi.

Í 2008 røkti felagsins 277 starvsfólk flúgving til 10 ferðamál við fýra flogførum við støð í Føroyum, flúgving fyri SAS til ferðamál í Evropa við trimum flogførum við støð í Keypmannahavn, og tyrlutænastan røkti alla innanoyggja flúgving og leiti- og bjargingararbeiði kring Føroyar umframt at vera virkin í hollendsku frálandavinnuni.

Atlantic Airways ger eisini nógv burturúr at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland og stendur fyri tollfríari sølu í Vágum.

Tilsamans flutti Atlantic Airways 593.000 ferðafólk í 2008. Talið á ferðafólkum á rutuflogførunum vaks úr 212.000 í 2007 upp í góð 215.000 ferðafólk í 2008.

### Útlit fyri 2009

Atlantic Airways væntar, at støðið á virkseminum innan rutuflúgving í 2009 fer at laga seg til sveiggini í búskapinum. Sum útlitini eru, verður helst talan um eina minking í ferðsluni, tí bæði útlendingar og føroyingar fara at ferðast minni.

Hóast felagið hevur góðar royndir frá samstarvinum við eitt nú SAS, væntar felagið eina munandi minking í leiguflúgvingini, tí minni virksemi er innan hetta økið í londunum kring okkum. Felagið hevur umstøður at umstilla seg og kann tí minka ella vaksa um talið á flogførum og flogmanningum við stuttum skotbrái. Sambært sáttmálanum endar flúgvingin fyri SAS í mai, og felagið fer tí væntandi at minka um talið á flogførum og flogmanningum.

- Atlantic Airways er eitt sera sterkt felag. Vit eru væl fyri fíggjarliga, hava eitt væl útbúgvið lið av starvsfólki, sum duga sítt arbeiði og hava virðismiklar royndir frá altjóða flogferðslu, bæði tá tað snýr seg um flúgving við flogførum og tyrlum. Hóast vit síggja fyri framman avbjóðandi ár, so kenni eg meg sannførdan um, at Atlantic Airways hevur dygdirnar, sum skulu til fyri at koma væl burtur úr komandi avbjóðingunum, sigur Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantic Airways.